## Tvey ár til høsnarungan

Fríggjadagin boðaði altjóða súkklusambandið frá, at tey nú fara undir discipliner-mál móti danska Michael Rasmussen, sum ikki heilt hevði greiðu á, um hann var í Mexico ella Italia, tá hann vandi upp til stóru Tour de France súkklukappingina. UCI ákærir Rasmussen fyri brot á fleiri paragraffir av súkklulógini, og kann revsingin verða upp til tvey ára bann frá ítróttini.



## Nýggjur hjálparvenjari á Amager

Nýggjur hjálparvenjari hjá Jacob Friis Hansen verður 33 ára gamli Mads Spur-Mortensen, sum júst er givin at spæla fótbólt. Hann hevur umboðað feløg sum Vejle, Næstved, Farum og HIK. Høvuðvenjarin hjá Fremad Amager kennir Mads Spur-Mortensen úr HIK, har hann var ein av spælarunum hjá Jacob Friis Hansen.

# Kappingin harðnar

**Tvey feløg liggja fremst, meðan trý feløg berjast um fjórða plássið, og kappingin tykist harðna fyri hvønn dyst, nú tað styttist til seinasta dyst í Meistaradeildini hjá kvinnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Í ár hevur besta flogbóltsdeildin hjá kvinnum verið merkt av, at tað bert hava verið tvey lið, ið veruliga kappast um gullkrúnurnar, og so skamt aftanfyri tey bæði liggur so eitt og lúrur, um eitt av teimum báðum fremstu skuldi byrjað at slingra.

Næst hesum trimum, liggja so trý lið og kappast um fjórða pláss.

### Ganga í bólkum

Fremst liggja SÍ og ÍF, ið hava slitið seg leyst av hinum, og teimum næst, liggur Dráttur, skamt aftanfyri. Og so koma trý feløg; Mjølnir, KÍF og TB, ið øll kappast um fjórða plássið. Tó má sigast at unga TB liðið haltar eitt lítið vet aftanfyri. Og aftast av øllum kemur so blaðunga Feyr liðið, ið eins og harrarnar hjá felagnum, hava nógv gott í væntu framyvir. Men í løtuni eru Fleyr pylsan í rosinuendanum, ella var tað rosinan í pylsuendanum.

### Favorittarnar vunnu

Fleyr høvdu vitjan av vágaliðnum Drátti, og Drátturskvinnur vunnu dystin trygt 3-0.

Í Klaksvík vunnu Mjølnirskvinnur aftur, og hesaferð vóru tað kvinnurnar úr Kollafirði, ið stóðu fyri skotum. Dysturin endaði 3-1 til heimaliðið, og tóku tær harvið eitt stórt fet nærri einum fjórða plássi.

Á Tvøroyri vóru ÍF á vitjan, og kvinnurnar úr Fuglafirði hava nógvar royndir, og mugu verða mettar sum harðastu kappingarneytarnar hjá SÍ.

Hóast ÍF vóru greiðir favorittar til sigurin í Trongisvági, so stóð á gomlum nøglum. Unga TB liðið góvu royndu leikarunum úr Fuglafirði skarpan gang, og settini vóru sera jøvn og spennandi. Mong høvdu kanska vænta at tað var ein avgreiðsluspurningur, men dirvi og áræði valdar í TB hópinum í hesum døgum, og tær vilja ikki bara skúgvast til viks, hóast mótstøðuliðini mangan eru meira roynd. Tær taka kampin upp, og kempa. Tað hoyrist av Tvøroyri, at TB spældi besta settið í kappingarárinum, tá tær knúgvaðu ÍF í fjórða setti.

Spennandi at síggja hvat kann spyrjast burturúr hesum spennandi hópi.

Í fimta og avgerandi settinum, ið vanliga verður rópt ein javnbrótari, komu vertirnar tó sera illa frá byrjan, og feilir í móttøkunum og nervakent spæl, hevði við sær at tær skjótt komu aftur um 1-5.

Tá einans verður spælt upp til 15 í javnbrótarum, er torført at koma aftur, eftir eina slíka byrjan, og dysturin fall tí til ÍF.

Ómetaliga spennandi verður at fylgja við, hvussu dysturin um oddin fer at enda, umframt at dysturin um fjórða pláss, sær út til at gerast alsamt meiri spennandi.



*Ungu tvørágenturnar góvu royndu fuglfjarðakvinnunum skarpan gang, og javnbrótari mátti spælast, áðrenn avgerðin varð funnin. Hetta ber brá av at tvørágenturnar eru fyri stórari menning, og spennandi er at síggja, hvat kann spyrjast burturúr*

## Úrslitini

**Meistaradeild, Kvinnur:**

| Dagur | Dystur | Úrslit |
|---|---|---|
| 09.02 | Fleyr-Dráttur | 0-3 (Okkum er ikki eydnast at fáa settúrslitini) |
| 10.02 | Mjølnir-KÍF | 3-1 (25-23, 25-23, 22-25, 28-26) |
| 10.02 | TB-ÍF | 2-3 (25-23, 20-25, 17-25, 25-23, 5-15) |

**Meistaradeild, Menn:**

| Dagur | Dystur | Úrslit |
|---|---|---|
| 09.02 | Fleyr-Mjølnir | 2-3 (18-25, 25-23, 25-12, 23-25, 12-15) |
| 10.02 | ÍF-SÍ | 2-3 (20-25, 26-24, 23-25, 25-22, 6-15) |

# Enn ein klassikari



*Høgni Viderø og hansara liðfelagar úr Fleyr eru gamaní endaðir á aftasta plássi, men glottar eru avgjørt fyri framman fyri unga havnafelagið*

**Gamalt var, at tá Fleyr og Mjølnir møttust til dyst í bestu flogbóltsdeildini, var talan um klassikara, og hetta heiti kann dysturin av sonnum vera kallaður enn. Um vikuskiftið fóru Mjølnir við øllum, men greiðir glottar eru at hóma á Fleyrliðnum**

FLOGBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Havnafelagið Fleyr hevði um vikuskiftið vitjan av Mjølnirs-monnum úr Klaksvík, og gamalt var at kalla dystin millum hesi sigursvandu feløg í føroyskum mansflogbólti fyri klassikarar. Hetta heiti kann av sonnum enn verða nýtt um hendan dyst.

### Gestirnar góða byrjan

Fyrsta settið byrjaði sera væl hjá gestunum úr Klaksvík, og teir vunnu tað eisini 25-18, eftir at Fleyr var komið í gongd.

Næsta settið gjørdist sera javnt og spennandi, men endin var, at Fleyr vóru omaná við einum 25-23 sigri, og sostatt var javnleikur í settum.

Í triðja setti hildu havnamenn góðu gongdina frá næsta setti, og vunnu tað rættuliga sannførandi 25-12.

Tann sannroynd, at Mjølnir ikki høvdu ráð at tapa fjórða sett, hevur óivað motivera teir, tí teir bardust sum úlvur á skóg fyri hvørjum einasta bólti, og tað sama gjørdu vertirnar. Endin var tó, at Mjølnir drógu longra stráið og vunnu harvið settið, og fingu tískil javnað til 2-2 í settum.

Fimta sett byrjaði ikki væl hjá Fleyr, og av tí sama høvdu teir trupult við at koma inn í aftur settið. Tó komu Fleyr rættuliga væl við aftur, og einu løtuna var støðan 13-12 til gestirnar. Tættari komu havnamenn tó ikki, og Mjølnir vunnu settið, og harvið eisini dystin. 3-2.

Mjølnir eru nú á 9 stigum fyri 9 dystir, og er tað nokk til at vera oddalið. Í hinum endanum er tað nú

### Framtíðin bjørt

Hóast tað nú er staðfest at Fleyr endar niðast í fremstu flogbóltsdeildini, heldur ein av leikarum felagsins ikki, at framtíðin sær døpur út. Høgni Viderø, ið áður hevur spælt við Fram, sigur at framtíðin er bjørt í havnafelagnum.

- Hóast tað nú er greitt, at vit ikki megna at náa triðja plássi, sær framtíðin alt annað enn døpur út hjá Fleyr. Vit hava fleiri ungar og evnaríkar leikarar, ið standa og banka á dyrnar, fyri at sleppa inn á besta liðið, so eg eri vísur í, at vit menna okkum longu til næsta kappingarár, sigur Høgni Viderø, ið hevur verið ein av teimum føstu á liðnum í ár.

### Sum ein finala, hvønn dyst

Fyrr í ár, var Eystein Elttør, libero leikarin hjá Mjølni, frammi í fjølmiðlunum, har hann millum annað tosaði um, at hvør dystur, ið eftir er, er sum ein finala. Og ikki kann sigast annað, enn at hesin, eins og allir undanfarnu dystir í seinnu hálvu av kappingini, hevur staðfest hesa sannroynd. Gamaní eru bert fýra lið í bestu deildini, men tey eru øll eitt sera gott boð uppá ein meistara. So vera liðini óbroytt til komandi kappingarár, ja so kunnu vit vænta okkum eitt rimmar flogbóltsár.